Allatíðina henda spennandi broytingar innan køkssnið - tað kanst tú uppliva hjá HTH. Tað gongur ikki ein mánaði har vit ikki broyta okkurt. Alt hetta gera vit fyri at geva pláss fyri nýggjum sniðum - fyri at skapa nýggjan íblástur til tín. Kom tískil inn á gólvið hjá Køksmiðstøðini.

...tú fært tað munandi betri hjá HTH

Køksmiðstøðin
Á Hálsi • FO-100 Tórshavn • Tel. 314949 • Fax 311330 • E-mail: hthdul@post.olivant.fo
www.hth-kokar.com

Bye bye Blue Bird mánakvøldið

Bye Bye Blue Bird er um tær báðar føroysku genturnar, Rannvá og Barbu, ið eru sera góðar vinkonur

FILMUR

Mánakvøldið klokkan 19.30 sýnir filmsfelag Norðurlandahúsins, Klipp, føroyska spælifilmin Bye Bye Blue Bird. Hetta er tann sætti av sjey filmum, sum filmfelag Norðurlandahúsið Klipp hevur á skránni veturin 2000-2001.

Stutt um filmin

Katrin Ottarsdóttir er Føroya einasti leikstjóri,og hon hevur skapt filmin Bye Bye Blue Bird. Filmurin gongur fyri seg ymsastaðni í Føroyum og er ein rørandi filmur, sum eisini lýsir væl land og fólk.

Filmurin er um tær báðar føroysku genturnar, Rannvá og Barbu, ið eru sera góðar vinkonur. Tær hava verið burturi í útlandinum í nøkur ár. Tær gera av at fara heimaftur at vitja familju og gera upp við fortíðina. Tær møta hinum eydnuleysa fiskaranum, Rúna, ið tær sleppa at koyra biltúr við, tí hann hevur nøkur ørindi at taka sær av runt um í landinum. Genturnar eru sera óvanliga íklæddar, og atburður teirra er ógvuliga provokerandi.

Bye Bye Blue Bird er ein sjáldsamur roadmovie. Hann hevur fantastiskar náttúrumyndir og búnarnir, ið designaðir eru av Edward Fuglø, eru nakað heilt fyri seg. Katrin hevur higartil vunnið fýra altjóða virðislønir, og áhugin í útlandinum er støðugt økjandi.

Sparikassin bíðar við útbygging

Góðu tíðirnar gera, at Norðoya Sparikassi hevur útsett ætlaða útbygging í nøkur ár

Eyðun Klakstein

Klaksvík: Norðoya Sparikassi hevur ognað sær økið sunnanfyri høvuðsdeildina í Klaksvík, og her er ætlanin at byggja nýggjan bygning.

Men hetta verður ikki gjørt fyrstu árini, hóast hølisviðurskiftini hava brúk fyri betringum. Í fyrstu syftu ætlar sparikassin at betra um viðurskiftini í verandi høvuðsdeild, og síðani byggja um nøkur ár.

– Tað er so nógv virksemi í samfelagnum júst nú, at vit vilja ikki seta enn meira ferð á við at fara undir eina stóra bygging, sigur Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa.

– Vit arbeiða ítøkiligt við ætlanum um at byggja, men hvat og hvussu hava vit ikki avgjørt enn, sigur hann.

Norðoya Sparikassi fer at betra um hølini í verandi høvuðsdeild, meðan ein uppíbygging má bíða nøkur ár.

Mynd: Eyðun Klakstein

Meira parkering

Umframt hølini ætlar Norðoya Sparikassi eisini at betra um parkeringsviðurskiftini við høvuðsdeildina. Og her verða onkrar broytingar í hesum árinum, gongst sum ælta.

Gomlu húsini hjá Skós skulu takast niður, og parkeringsøkið sunnanfyri Sparikassan skal sostatt víðkast.

Við árslok starvaðust 34,4 starvsfólk í sparikassanum, tá umroknað verður til fulla tíð.

Næmingar aftur til arbeiðis

Næraberg skal landast sum skjótast, og tá er brúk fyri nógvum fólki fyri at arbeiða í vaktum

FISKIVINNA
Eyðun Klakstein

Klaksvík: Hósdagin kom stóri svartkjaftatrolarin, Næraberg, til Klaksvíkar við fullari last av surimi og mjøli.

777 tons av surimi og 270 tons av mjøli skulu fáast í land, áðrenn trolarin aftur fer til fiskiskap.

Veiðan verður lødd upp hjá Northern Fish Cold Storage í Klaksvík, og arbeitt verður við so at siga út í eitt til skipið er tømt.

Næraberg hevur fiskað væl seinasta mánaðin, og nú verður veiðan lødd upp í Klaksvík.

Mynd: Eyðun Klakstein

Seinast Næraberg landaði í Klaksvík fingu skúlanæmingar í skúlanum við Ósánna frí, so teir kundu fara til arbeiðis.

Í gjár fóru næmingar aftur til arbeiðis, men hesaferð passaði tað soleiðis, at terminsroynd var, og hon var liðug longu klokkan 9 fríggjamorgunin. Eftir tað høvdu næmingarnir frí, og tá var lag á manni at fara at landa.

– Flest allir næmingarnir dámdu ómetaliga væl at sleppa til arbeiðis, seinast Næraberg varð og landaði, so tað eru nógvir av somu næmingum, sum nú eru farnir aftur at landa, sigur Símun Petur Hjelm, skúlastjóri í skúlanum við Ósánna.

Ídnaðarøkið skal verða meira lokkandi

Klaksvíkar kommuna ætlar sær nú at fríðka um ídnaðarøkið á Borðoyavík

ÍDNAÐUR
Eyðun Klakstein

Klaksvík: Síðani ídnaðarøkið á Borðoyavík varð gjørt fyri nógvum árum síðani, er bara ein nýggjur bygningur bygdur í økinum.

Klaksvíkar kommuna ætlar, at ídnaðarøkið skal koma betur til sín rætt, og tí ætlar kommunan at fríðka um økið.

Ídnaðarøkið á Borðoyavík skal verða meira lokkandi hjá feløgum og fyritøkum at byggja á, heldur Klaksvíkar kommuna.

Mynd: Eyðun Klakstein

– Tað kann kanska gera økið meira lokkandi hjá fyritøkum og feløgum, sum umhugsa at byggja, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík.

Eitt bygningur, sum hýsir bilverkstaði, er í økinum, men annars liggur økið tømt og klárt at byggja á. Klaksvíkar kommuna ætlar at gera innkoyringina til økið betur og annars at fríðka um.

Økið liggur rímuliga væl fyri, tí frástøðan til tunnilsmunnan á undirsjóvartunnlinum um Lorvíksfjørð fer at liggja nærindis.

Songrøddin í høvuðsstaðnum

Leygarkvøldið fara 9 sangara og bólkar at kappast um eitt finalupláss í Ársins songrødd

KAPPING
Eyðun Klakstein

Leygarkvøldið verður triðja innleiðandi umfarið í Ársins songrødd. Hetta umfarið verður í Badmintonhøllini í Havn og 9 sangarar og bólkar fara at luttaka.

Higartil eru fýra luttakarar komnir í finalluna, har samanlagt 10 fólk ella bólkar verða við.

Í Havn var undirtøkan fyri kappingini so stór, at neyðugt var við tveimum innleiðandi umførum. Men fyri at varðveita býti millum partarnar av landinum, kemur bert ein luttakari víðari frá hvørjum innleiðandi umfari í høvuðsstaðnum.

Tí verður kappingin hørð, tá 9 sangarar og bólkar fara á pallin í Badmintonhøllini leygarkvøldið.

Malan syngur

Sjálv sangkappingin byrjar klokkan 23.30, og um eitt-tíðina sunnunáttina verður vinnarin kosin.

Eftir sjálva sangkappingina verður DJ-show longur út á náttina. Eisini fer songkvinnan, Malan Eyðunsdóttir, at syngja sangir av fløguni, sum hon gav út fyri nøkrum mánaðum síðani. Fleiri av sangunum á hesi fløgu hava verð nógv at hoyrt síðani.

Finalan í Ársins songrødd verður í Badmintonhøllini í Havn leygarkvøldið 9.juni.

Harmonikutónleikur í Norðurlandahúsinum

Hóskvøldið 5. apríl verður konsertin »Nordisk Mastermøte« í harmonikuspæli í Norðurlandahúsinum. Við á konsertini eru harmonikuleikarar úr Finnlandi, Álandi, Svøríki og Noregi. Umframt harmonikuspælararnir, so verður ein bassspælari og ein spælir á klaver.

Hetta er úrslit av einum norðurlendskum samstarvi millum Norðurlandahúsini á Álandi, Grønlandi, Íslandi og í Føroyum.

Mikukvøldið 4. apríl kl. 19.30 fara tey, ið spæla konsertina, at hava work-shop fyri áhugaðum.

Annars hevur Norðurlandahúsið kunngjørt skránna fyri apríl mánað. Tað fyrsta á skránni er ein framsýning, sum Postverk Føroya skipar fyri í sambandi við, at stovnurin verður 25 ár.

Størsta og kanska mest spennandi tiltakið í húsinum næsta mánaðin verður Prix Føroyar finalan. Hon verður leygarkvøldið 21. apríl klokkan 20.

Ferðin verður leygarkvøldið

Leygarkvøldið verður tónleikaverkið Ferðin eftir Sunleif Rasmussen framført í Norðurlandahúsinum.

Konsertin byrjar klokkan 19.30, og aftaná hetta verkið, verður tað Føroya Symfoniorkestur, sum fer at framføra symfoni nr. 9 eftir Dvorak, »New World«.

Framsýning



Sunnudagin verður framsýning í Kvívíkar skúla. Framsýningin verður frá klokkan 15 til 19. Tað eru kvøldskúlanæmingar, ið fara at sýna ymiskt fram, sum tey hava tilevnað gjøgnum veturin. Tað er fyri tað mesta lutir, sum eru tøvdir ígjøgnum veturin á kvøldskúlanum.